# Undirvísingin laðað eftir næmingunum



**NámX, 10. flokkur, á Eysturskúlanum í Havn er ein sólskinssøga. Unidrvísingin er lagað eftir ynskjunum og áhugamálunum hjá hvørjum einstøkum næmingi**

Randi Jacobsen
Myndir: Álvur Haraldsen



*Bjarni Djurholm veit av royndum at næmingar, sum fáa útbúgving í kreativum lærugreinum, fara at blóma*

Tað er týsmorgun, og vit fara á vitjan hjá NámX í Eysturskúlanum í Havn.

Nám stendur fyri at nema. X er 10-talið í rómversku stavskipanini.

Í gongini standa rúgvuvís av skóm og styvlum.

– Her lata øll seg úr um beinini, so gólvini eru rein, og hetta eru vaskikonurnar fegnar um, sigur Bjarni Djurholm, leiðari á NámX.

Henda morgunin ganga fleiri næmingar og mala á gongini, tí teir vita ikki, hvar teir skulu møta.

Enn er skúlaárið so nýtt, at allir næmingarnir hava ikki vant seg við, at teir hvønn morgun skulu fara inn á telduna at hyggja eftir boðum frá lærarum sínum. Lærarin, sum teir hava hvønn ávísan tíma, leggur teimum boð, hvar og nær teir skulu møta.

Henda morgunin koma fleiri næmingar til Bjarna Djurholm at spyrja, og hann vísir teimum til teldu-skipanina.

Áðrenn NámX byrjaði, hoyrdust mótmæli frá lærarum á øðum skúlum, men nú valdar friður.

Næmingarnir á NámX eru fegnir, og Bjarni Djurholm hevur varhugan av, at tað eru lærarnir eisini, sjálvt um teir hava fingið eina nýggja og tíðarkrevjandi avbjóðing.

## Kreativitetur

Tá ið farið varð undir at fyrireika NámX, varð hugt eftir onskum viðurskiftum, tí føroyska og danska skúlskipanin eru álíkar. Lætta loysnin við bara at gera tað sum aðrastani, varð ikki brúkt. Útgangsstøðið var tann sannroynd, at helvtin av næmingunum eftir 9. flokk ikki hevði hug at fara í 10. flokk, og hin helvtin hevði hug. Tað kundi verið, at 10. flokkur ikki hevur verið nóg spennandi.

– Eg havi arbeitt í so nógv ár á tekniska skúla, og eg havi arbeitt á handilsskúlanum, so eg visti, at við at geva næm-ingum undirvísing í kreativ-um lærugreinum, blóma teir, sigur Bjarni Djurholm.

Undirvísingin er sett saman av tveimum breytum við fleiri lærugreinum undir. Hesar breytirnar skulu næmingarnir velja. Tað gevur 20 tímar. Haraftat skulu teir velja millum átta av teimum vanligu lærugreinunum.

Mett varð, at 140-150 næm-ingar fóru at ganga á NámX. Yvir 200 teknaðu seg, men tá ið saman um kom, og nøkur vóru dottin frá, tí tey høvdu eisini søkt eitt nú studentar-skúla ella handilsskúla, kom talið niður á 187 næmingar.



*Onkutíð eru stundir til spæl*

## Byrjanin til vaksna lívið

– Vit leggja stóran dent á, at NámX ikki er eitt framhald av 9. flokki. NámX er byrjanin til vaksna lívið hjá teimum ungu, sigur Bjarni Djurholm.

Á NámX sita næmingarnir ikki bundnir á einum stóli í tímar. Teir arbeiða fyri ein stóran part sjálvstøðugt í modulum.

Í stóru høllini sita fleiri næmingar og arbeiða. Onkur situr við eina teldu, onkur teknar, onnur práta saman á sofunum, og stundir eru eisini til at spæla eina løtu.

Bjarni Djurholm sigur, at skúlin hevur gjørt sítt besta til at skapa eitt gott ungdómsumhvørvi.

– Vit uppliva longu, hvussu væl næmingarnir trívast her. Tey halda fram við at arbeiða, eftir at tímin er liðugur, og tey eru eisini her, tá ið tey hava frí, sigur leiðarin.

## Gera matstovu

Nógv verður arbeitt við verkætlanunum.

Í eini stovu situr ein stór-ur flokkur av næmingum saman við lærara sínum og prátar.

– Vit fyrireika at lata upp matstovu, siga tey.

Áðrenn tey koma til tað, mugu tey kanna, hvat lógirnar siga, hvørji krøvini frá Heilsufrøðiligu Starvs-stovuni, hvat skal til fyri at stovna eina fyritøku o.a.

Næmingarnir læra, hvussu teir bera seg at við at fáa hesa vitan.

Ein matstova má hava eina góða matarskrá, sum tey eisini fara at gera. Mat-stovan skal hava stjóra og starvsfólk.

– Vit miða eftir at lata mat-stovuna upp í november, siga tey.

## Gera heimasíðu

Á miðlabreytini fyrireika tey at gera eina sjálvstøðuga heimasíðu til NámX.

Eyguni á næmingunum eru sum límað upp á teldu-skíggjanum.

– Í morgun ganga vit ígjøgnum, hvat ein heimasíða skal hava av innihaldi, greiðir lærarin frá.

Ein bólkur skal arbeiða við video, ein við myndartøku, ein bólkur fer at skriva um ítrótt, ein tíðindi, og gerast skal ein reportasja frá, tá ið Eysturvøllurin við skúlan varð tikin í nýtslu.

– Vit vænta, at hetta verður ein góð heimasíða, sigur lærarin.

Hann avdúkar, at heima-síðan fer stutt og greitt at eita NamX.fo.

## Nógvir valmøguleikar

NámX hevur tvær breytir, sum allir næmingar skulu velja seg inn á. Fleiri valfríar lærugreinnar eru eisini.

Onkuntíð fáa næming-arnir undirvísing í komm-unuskúlanum og ganga so millum skúlarnar.

Nevnast kann, at ein lærugrein eitur betri lesing og er ætlað teimum lesiveiku næmingunum.

– Tað er bara ein ásannan av, at summir næmingar eru lesiveikir, antin tí teir eru orðblindir ella annað bagir. Nakrir næmingar hava eisini teknað seg til hetta.

## Royndarár

Við tað at skúlaárið enn er so nýtt, er alt ikki komið í heilt fasta legu.

Kommunan setti E-lon-ina á Eysturskúlanum við 10 skúlastovum í stand til NámX, og tað arbeiðið er ikki heilt liðugt.

– Hetta er eitt royndarár. Vit halda, at tað gongur væl. Vit hava lært nógv, men sjálvandi kann okkurt gerast betri, sigur Bjarni Djurholm.

Taðà gongur sum ein tráður gjøgnum alt í NámX, at næmingunum verður víst álit, og teir hava ábyrgd.

– Vit hava tosað um tað her á NámX, at hesir næming-arnir eru sera hampiligir og skikkiligir í allar mátar, sigur Bjarni Djurholm.